## DAGSINS MEINING

# Orð ímóti orði

”Vit hava í ár fingið tvær lógir, sum broyta viðurskifti okkara við Danmark. Yvirtøkulógina, sum ger, at vit kunnu yvirtaka málsøkir, nær og tá vit vilja. Og uttanríkispolitisku lógina, sum ger, at vit kunnu vera virknari og sjónligari í uttanríkispolitikki. Báðar lógirnar staðfesta eisini, at tey næstu stigini á sjálvstýrisleið valdast okkara vilja og áræði. Herfyri varð uttanríkispolitiska lógin fráboðað Sameindu tjóðum. Í hesi fráboðan varð sjálvsavgerðarrætturin hjá Føroya fólki staðfestur í altjóðasamfelagnum. Sjálvsavgerðarrætturin, yvirtøkulógin og nýggja stjórnarskipanin, sum skal vera liðug við árslok næsta ár, gera, at vit nú av røttum kunnu siga, at sjálvstýrismálið er okkara burturav.” Hesi orðini í nýttársrøðu løgmans hava loypt øði í formann Tjóðveldisfloksins. Øði er ikki orðið. Formaðurin var í tíðindasending sjónvarpsins so illur, at hann skuldsetti løgmann fyri beinleiðis at lúgva. Her stendur nú orð í móti orði.

Nú er tónalagið millum andstøðu og samgongu nógv harðnað í vetur. Hetta kann standast av ymiskum viðurskiftum. Ein orsøk er ivaleyst ein støðugt og skjótt vaksandi frustratión í Tjóðveldisflokkinum yvir at vera uttan politiska ávirkan á dagliga politikkin. Flokkurin, sum í seks ár hevði meira vald, enn nakar einstakur flokkur áður hevur havt, tykist nú vera heilt uttanfyri politiskt vald. Floksleiðslan sær fyri sær gamla ræðslusenariið frá tíðini fyri 1974, tá flokkurin slapp inn í politiska hitan hjá Javnaðarflokkinum og Fólkaflokkinum. Hetta var oyðimarkartíðin, sum eldri tjóðveldisfólk minnast hana.

Men so kom vend í, og flokkurin valdi at vinna sær ávirkan á dagliga poltikkin. Alt ella einki linjan varð slept. Tjóðveldisflokkurin vísti tá skjótt, at hann var bæði stjórnarduguligur og stjórnarsinnaður. Við tveimum framúrskarandi landsstýrismonnum, Finnboga Ísakson og Peturi Reinert, vann Tjóðveldisflokkurin sera stóra virðing og og kundi vísa á stór úrslit, serstakliga á útbúgvingar- og fiskivinnuøkinum. Postverkið varð, undir hegnisligu leiðslu Finnboga, yvirtikið og gjørdist ein verulig sólskinssøga. Strandferðslan somuleiðis nútímansgjørd undir somu leiðslu við sama góða politiska handalagi og stórum dirvi. Hetta skeiðið gjørdist eisini støðið undir álitisfullum, loyalum og góðum samstarvi millum Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin. Hesi góðu viðurskifti vardu, til ættarliðskiftið hendi í Tjóðveldisflokkinum. Við hesum ættarliðsskifti fór flokkurin aftur til hitt gamla lagið at meta Javnaðarflokkin sum aðalfíggindan. Tónin frá fimtiárunum kom inn aftur í føroyskan politikk. Týðuligast kom hetta til sjóndar, tá ið Javnaðarflokkurin varð settur uttan fyri fullveldissamgonguna, hóast flokkurin í sjálvstýrismálinum varð sinnaður at fara nógv longur enn t.d. Sjálvstýrisflokkurin, sum slapp inn í hitan. Politiska oyðimørkin varð ætlað Javnaðarflokkinum. Men so gekk alt jú øðrvísi av orsøkum, sum vit lata liggja her.

Tað er møguliga við hesum baksýni, ið ein skal meta ta politisku hólmgongu, sum nú leikar á millum løgmann og formann Tjóðveldisfloksins. Javnaðarflokkurin setti fót fyri fullveldisætlanini. Henda tilgongd er endað við yvirtøkulóg og uttanríkispolitiskari heimildarlóg, sum hava sett okkum aftur um heimastýrislógina! sigur formaðurin. Um henda myndin er røtt, er sera ivasamt. Tað kann við góðum grundum verða spurt, um tað er rættvíst at gera Javnaðarflokkin til syndaran. Hvat er samtykt við hesum báðum nevndu lógum, sum ikki longu frammanundan varð skitserað í Tvøroyararskjalinum? Hvat er so nógv øðrvísi enn tað, sum fullveldissamgongan sjálv var í ferð við at fremja? Valla nakað uttan tær vanlukku ymisku viðmerkingarnar til ávikavist føroysku og donsku heimildarlógirnar. Men tað er í og fyri seg nóg mikið. Hetta er ikki nóg gott lógararbeiði. Ein lóg, sum eftirfylgjandi gevur so nógvar tulkingarmøguleikar orsakað av mótstríðandi viðmerkingum, er ikki nóg væl úr hondum greidd. Tað má bara ásannast, at her hava umsitingarnar og ráðgevingarnar hjá løgmanni eins og hjá forsætisráðharra sovið í tímanum. Sama er um løgting og fólkating at siga. Hinvegin er lógarteksturin greiður. Føroyar hava heimildirnar og sjálvsavgerðarrætturin er staðfestur. Eftir stendur tað sera ófantaliga tónalagið millum flokkarnar, sum hvørki gagnar fólkaræði ella samstarvi. Her eigur onkur at taka annað skinn um bak, at endurskoða bæði strategi og taktikk og at fara undir konstruktivan andstøðupolitikk. Hendir hetta ikki, bíðar politiska oyðimørkin enn einaferð fyri framman. Tað gagnar ongum – heldur ikki føroyskum fólkaræði sum heild.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Eitt slysálop á alla ta føroysku fullveldisrørsluna

**Høgni Hoydal**



Nýggjársrøðan hjá løgmanni var sum tað nógva av fýrverkinum á nýggjárinum: Ein roynd at senda eitt sindur av glitri upp í loft, eitt sindur av royktámi og eitt sindur av físi. Tað kostar nógv, men aftanfyri er onki, og tað fellur skjótt til jarðar.

Haldi, at løgmaður misnýtir nýggjársrøðuna til at gera politiska propaganda fyri einum landsstýri, sum ongan politikk hevur og sum hevur sent neyðrakettir út alt undanfarna árið.

**Tolsemi og samfelagið fyri øll?**

Løgmaður tosaði væl um millum annað um tolsemi, fjølbroytni og eitt samfelag fyri øll. Men hansara egna landsstýri hevur rikið útlendingar av landinum og økir við sínum fíggjarpolitikki og skattapolitikki stættarmunin í Føroyum hvønn dag.

Vit hava jú eitt landsstýri, sum tekur frá teimum fátæku og gevur teimum ríku. Uppá tvey ár, hava teir brúkt alt tað, sum vit spardu upp undanfarnu árini – og brúkt tað til tey, sum frammanundan hava mest.

**Læntir fjaðrar**

Løgmaður vísir á nøkur positiv viðurskifti í búskapinum og í samfelagnum. Men tað positiva, sum hann tekur fram, er alt framt av einum vinnulívi, sum hevur stríðst fyri at standa á egnum beinum, hóast hetta landsstýrið hevur verið væl á vegaftur í studningspolitikkin. Harafturat eru tey almennu tiltøkini, sum løgmaður tekur fram, øll framd í undanfarna landsstýri: Nýggi Smyril, útbyggingar í landinum, íslandssáttmáli og eitt blómandi mentanarlív.

Hetta landsstýrið hevur ikki framt nakað nýtt tiltak. Tað hevur tvørturímóti steðgað skúlabygging, skert mentan og gransking – og so seint sum fyri tveimum vikum síðani atkvøddi samgongan hjá løgmanni ímóti øktum játtanum til musikksskúlan, tjóðpallin, mentanargrunnin og gransking.

**Torvmold í eyguni**

Løgmaður kann ikki vísa á nakað mál, sum hetta landsstýrið hevur framt. Men hann roynir framvegis at kasta torvmold í eyguni á fólki við at tosa um yvirtøkulógir og uttanríkispolitiskar heimildir – hóast tað er greitt, at hesar lógir hava skumpað okkum langt afturum heimastýrislógina.

Tildømis vita vit, at Íslandssáttmálin hevði ongantíð verið framdur, um hann ikki varð gjørdur áðrenn hendan sonevnda uttanríkispolitiska heimildarlógin kom í gildi.

Vit vita, at alt tos hjá løgmanni um EFTA og altjóðagerð í dag verður forðað av júst hesum sambandslógunum, sum vórðu skrumblaðar ígjøgnum løgtingið á miðjari nátt.

**”Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne” til ST**

Og so kom løgmaður við eini nýggjheit, sum má metast sum eitt tað størsta álopið á føroysku fullveldisrørsluna í nýggjari tíð: Hann boðar frá, at hendan sonevnda uttanríkispolitiska lógin nú er fráboðað ST.

Tað merkir, at løgmaður hevur góðtikið, at danska stjórnin hevur boðað altjóða samfelagnum frá, at vit eru “Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne” – at vit bert eru húskallar og fulltrúar hjá Danmark. At vit ikki kunnu gera avtalur við onnur lond, um tað gongur ímóti donskum áhugamálum – og at Danmark hevur evsta valdið yvir øllum føroyskum viðurskiftum við umheimin

Hetta er hent uttan at Føroya fólk er spurt ella nakar veit, hvat gongur fyri seg. Og so dittar løgmaður sær at sita og fortelja Føroya fólki at okkara sjálvsavgerðarrættur er staðfestur.

Nakað munnu tey flenna niðri í forsætisráðnum í dag. Danska stjórnin hevur fingið júst tað, sum hon hevur ynskt eftir, og so fær hon ein føroyskan løgmann til at sita og gleðast um tað í eina nýggjársrøðu

Løgmansrøðan sigur okkum so mikið, at 2006 eigur at gerast árið, har føroyska fullveldisrørslan ger upp við sambandspolitikkin hjá løgmanni og ikki letur seg rura í svøvn av fýrverki, royki og físum.

# Svar til Súsanna Mortensen og Súsanna Holm, Kvívík

**Mogens Tilsted Christensen**



Kære Súsanna og Súsanna. Jeg har læst jeres læserbrev i bladene og på min hjemmeside www.teologen.dk . Jeg er meget ked af, at I synes at mit julebrev af 23-12-2005 var usømmeligt, kedeligt, uforskammet og hadsk.

Jeg forstår det slet ikke. Jeg har gennempløjet mit julebrev igen og igen.

Jeg har drøftet det med flere præster, minister og flere lagtingsmedlemmer samt mange andre anonyme og private færinger.

De har alle ringet til mig i nytårsdagene ind imellem de mange gudstjenester og møder, jeg også har afholdt i nytårsdagene.

Samtlige opkald fra ovennævnte prominente såvel som almindelige mennesker bakker mig op og støtter mig i alt, hvad jeg har skrevet i julebrevet.

Ikke én eneste af de mange mange telefonopkald, der en overgang foregik med to telefoner, så den ene ringede, inden jeg var færdig med samtalen i den anden telefon, var negative. Ingen af henvendelserne var negative.

Ingen af dem kan se, at det hverken er usømmeligt, kedeligt, uforskammet eller hadsk, som I påstår. Det må I så forholde jer til og tænke over også.

Nb.: Prøv en kristen surftur på vækkelsesportalen www.teologen.dk


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.